| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 28. november 2013 |
| Býráðsfundur nr. | 11/2013 |
| Borgarstjóri | Sonni á Horni |
| Fundarskrivari | Jákup Frants Larsen |
| | |

Ár 2013 tann 28. november kl. 16.30 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 22. november 2013 um innkalling til fundar.

**Møtt vórðu:**

Sonni á Horni
Magnus S. Midjord
Sigga Óladóttir Joensen
Sigurð S. Simonsen
Dánjal Vang
Petur Abrahamsen
Eyðun á Lakjuni
Árant Berjastein
Birgir Petersen

Við á fundinum luttók eisini Maris S. Thomsen, fíggjarleiðari

**Skrivari:** Jákup Frants Larsen, býráðsskrivari

**Mál nr. 57/2013.**

**2. viðgerð av uppskoti til fíggjarætlan fyri kommununa fyri 2014**

*Fíggjarnevndin hevur móttikið uppskot frá fyrisitingini, dagfest 15. november 2013 til fyribils fíggjarætlan fyri kommununa fyri ár 2013, har uppskotini frá føstu nevndunum eru tikin við inn í uppskotið.*

*Vísandi til grein 39, stk. 1 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mei 2000 um kommunustýri við gildiskomu tann 1. januar 2001, so skal fíggjarnevndin fyri 1. oktober leggja uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið. Sambært stk. 2 í somu grein stendur, at kommunustýrið skal viðgera uppskot til fíggjarætlan 2 ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili, og skal ætlanin verða endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember.*

Fíggjarnevndin hevur á fundum 13. og 21. november 2013 viðgjørt uppskot til 2. og endaligu viðgerð í býráðnum 28. november 2013, og mælir nevndin á fundinum 21. november há. býráðnum til at góðkenna hjálagda uppskot til fíggjarætlan kommununar fyri 2014.

Nevnast skal, at viðgerð hevur verið í nevndini tann 18. september 2013 í sambandi við uppskoti til 1. viðgerð (karmar) og á býráðsfundi tann 26. september. Eftir býráðsfundin hava nevndirnar viðgjørt uppskot til fíggjarætlan fyri teirra øki, bæði viðvíkjandi rakstri og íløgum, sum løgd vórðu fyri arbeiðsfund býráðsins.

Hesir arbeiðsfundir (temadagar) varð hildin millum alt býráðið tann 19. og 20. november 2013, somuleiðis sum víðari viðgerð hevur verið á fundi í fíggjarnevndini tann 21. november 2013. Á arbeiðsfundunum vórðu býarverkfrøðingurin og leiðarin á sosialu deildini innkallað til fundar fyri at geva frágreiðingar um teirra økir.

Rakstrarútreiðslurnar brutto verða mettar til kr. 55.002.650,00, netto til kr. 39.175.350,00, rentuútreiðslur og rentustuðul til kr. 3.572.000,00, avdráttirnir av føstum lánum til kr. 2.200.000,00 og íløgurnar brutto til kr. 31.750.000,00 og netto til kr. 30.550.000,00.

*Talan verður um hesar íløgur brutto:*

| | |
|---|---|
| Øki 2. Almanna og heilsumál | kr. 1.500.000,00 |
| Øki 3. Børn og ung | kr. 300.000,00 |
| Øki 4. Undirvísing | kr. 4.330.000,00 |
| Øki 5. Mentan og frítíð | kr. 1.950.000,00 |
| Øki 6. Teknisk mál | kr. 13.220.000,00 |
| Øki 7. Kommunal virki | kr. 10.450.000,00 |
| **Samantals:** | **kr. 31.750.000,00** |

Roknað verður við íløguinntøkum á øki 5 upp á kr. 600.000,00, sum er íløgustuðul í graslíki og søla av grundstykkjum á øki 6 upp á 600.000,00 ella tilsamans kr. 1.200.000,00. Nettoíløgurnar verða sostatt mettar til kr. 30.550.000,00.

Íløgur í øki 2 "Almanna- og heilsumál" kr. 1.500.000,00 eru til Vesturstovu og til byrjanararbeiði við nýggjum Ellis- og røktarheimi. Tó verður peningur til keyp av lendi á vestara landinum til heimið avsettur undir øki 6, við tað at talan verður um samlað lendiskeyp til hetta endamál, eins og til gongugøtuna Kambsdal/Fuglafjørður og til sethúsaútstykking.

Íløgur í øki 3: Børn og ung" kr. 300.000,00 eru til liðuggerð av uttanumøki á "Stropanum". Íløgur í øki 4: Undirvísing kr. 4.330.000,00 eru til nýbygging av skúla og til undirvísingaramboð. Íløgur í øki 5: Mentan og frítíð kr. 1.950.000,00 eru til nýtt graslíki vm. og til uppstigan av Mentanarhúsinum. Íløgur í øki 6: Teknisk mál kr. 13.220.000,00 eru til nýggjar vegir, kloakkir, útstykkingar, vatnveitingar, lendiskeyp vm.

Íløgur í Fuglafjarðar havn øki 7 kr. 10.450.000,00 verða útgreinaðar soleiðis, at kr. 10,0 mió. verða avsettar til útfylling/planering/bryggjukant til fóðurgoymslu hjá Havsbrún, kr. 350.000,00 til asfaltering og kr. 100.000,00 til bátadrátt í Støð. Vísandi til býráðssamtyktina frá 31. oktober 2013, so verður miðað fram ímóti at finna alternativa fígging til írestandi kr. 5,0 mió. til havnabyggingina, um so verður, at øll íløgan upp á kr. 15,0 mió. skal verða framd í 2014.

Mælt verður býráðnum til at lána kr. 5.000.000,00, nýta kr. 8.000.000,00 av innistandandi peningi til partvísar íløgur, eins og kr. 9,0 mió verða framfluttar av óbrúktum íløgum frá fíggjarárinum 2013.

Inntøkurnar av A+B skatti verða mettar til kr. 45.285.790,00 við skattaprosenti 21,5%, skattur av kapitaleftirlønum til kr. 1.200.000,00, meðan partafelagsskatturin verður mettur til kr. 7.000.000,00. Samlaðu skattainntøkurnar verða sostatt mettar til kr. 53.485.790,00.

Barnafrádrátturin í kommunuskattinum hækkar við kr. 500,00 pr. barn, nevniliga úr kr. 5.000,00 í 2013 upp í kr. 5.500,00 pr. barn í 2014.

Haraftrat verður eisini talan um lækking av barnagarðs- og vøggustovugjøldunum á ansingarstovnunum hjá kommununi frá 01. januar 2014 at rokna, somuleiðis sum ansingargjaldið á Frítíðarskúlanum eisini verður lækkað.

- Vøggustovugjald úr kr. 2.200,00 niður í kr. 1.700,00 ella við kr. 500,00 um mánaðan.
- Barnagarðsgjald úr kr. 1.700,00 niður í kr. 1.300,00 ella kr. 400,00 um mánaðan.
- Gjald til Frítíðarskúla úr kr. 995,00 niður í kr. 700,00 ella við kr. 295,00 um mánaðan.

Annars eru kr. 550.000,00 avsettar til liðuggerð av 2 bindum av Fuglafjarðar søgu, soleiðis at útgávan kann verða fingin frá hondini fyrst í 2015. Somuleiðis eru avsettar kr. 320.000,00 til útskiftan av tekjuni í læknahúsinum.

Sum lýst omanfyri verða kr. 8,0 mió. nýttar av innistandandi peningi til íløgur, meðan ætlanin er at lána pening til íløgur upp á tilsamans kr. 5,0 mió.. Hetta førir við sær, at skuld kommununar verður økt við kr. 2,8 mió., við tað at kr. 2,2 mió. verða rindaðar í avdráttum av lánum kommununar í 2014. Hesi viðurskifti føra við sær, at mett verður, at lánskuld kommununar netto við árslok 2014 verður umleið 0,75% av eini álíkning við skattaprosenti 23,0%.

Hjálagt verður sent yvirlit yvir metta nettoskuld kommununar pr. 31. desember 2013 eins og íløguyvirlit hjá fíggjarnevndini fyri 2014.

Uppskotið til fíggjarætlan fyri 2014 javnvigar við ***kr. 92.552.650,00*** við einum avlopi upp á kr. 3.440,00.

Uppskotið hevur sum nevnt verið til 1. viðgerð á býráðsfundi tann 26. september 2013 og varð samtykt at beina tað aftur í fíggjarnevndina til víðari viðgerðar fyri síðan at leggja uppskot fyri býráðið til 2. viðgerð, sum nú við hesum verður gjørt.

Fíggjarætlanaruppskotið hevur sum nevnt frammanfyri verið til viðgerðar í fíggjarnevndini tann 21. november 2013 og verða hervið við tilmæli lagt fyri býráðið tann 28. november 2013 til viðgerðar og samtyktar.

**Avgerð:**
Samtykt varð at taka undir við tilmælinum frá fíggjarnevndina og góðkenna fíggjarætlanina fyri kommununa fyri fíggjarárið 2014, sum javnvigar við kr. 92.552.650,00. (9-0).

**Mál nr. 58/2013.**

**Viðv. eykajáttan til Mentanarhúsið í Fuglafirði.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið skriv frá leiðaranum fyri Mentanarhúsið, dagfest 22. oktober 2013, hvar søkt verður um eykajáttan til Mentanarhúsið fyri árið 2013, og at flyta tað, sum eftir stendur á íløgukontoini yvir á rakstrarkontoina.

Fleiri faktorar gera tað, at kontan er farin langt yvir ta játtan, sum býráðið hevur veitt Mentanarhúsinum, men at seinastu mánaðar av árinum eiga at bøta nakað upp á tølini. Tá metir hann, at hetta ikki er nøkur trygd, og ringt er at meta um, hvussu nógvur peningur kemur inn restina av árinum, tí henda branchan er óútroknilig.

Søkt verður býráðið um at fáa kr. 300.000,00 í eykajáttan og at fáa tað flutt, sum stendur á íløgukontoini hjá Mentanarhúsinum yvir á rakstrarkontoina afftrat. Mett verður, at hetta er nóg mikið fyri fíggjarárið 2013.

Við telduposti frá fyrisitingini til leiðaran, dagfest  oktober 2013 verður boðað frá, at tað tað roknskaparliga ikki letur seg gera at flyta ónýtta íløgujáttan yvir á rakstrarjáttan uttan við eini eykajáttan.

Annars hevur málið um fíggjarligu støðuna í Mentanarhúsinum verið til viðgerðar/umrøðu á fundum í fíggjarnevndini 18. september og 23. oktober 2013.

Málið hevur aftur  verið til viðgerðar á fíggjarnevndarfundi tann 30. september 2013, og tekur nevndin tekur undir við áheitanini frá leiðaranum fyri Mentanarhúsnumi, og mælir nevndin  býráðnum til at veita eina eykajáttan á kr. 300.000,00 til rakstur av Mentanarhúsnium fyri fíggjarárið 2013, hetta sambært § 41, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri.

Staðfest er, at kr. 444.000,00  eru avsettar á rakstrarstaði 05.24.15.530.12 á konto 141001: "Keyp av vørum og tænastum", og við eini eykajáttan upp á kr. 300.000,00 verður upphæddin broytt til kr. 744.000,00.

Fíggingin verður fingin til vega av innistandandi peningi, hetta vísandi til somu grein í omanfyri standandi lóg.

Ein eykajáttan, sum henda, førir eina útreiðslu við sær, sum hevur beinleiðis ávirkan á roknskap kommununar fyri 2013.

Tá ið talan er um eina eykajáttan, skal málið hava 2 viðgerðir í býráðnum við í minsta lagi 14 daga millumbili, hetta sambært § 41, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17 mei 2000 um kommunustýri, og skal endaliga avgerðin verða kunnað Fíggjarmálaráðnum í seinasta lagi 3 dagar aftaná samtyktina við 2. viðgerð, hetta sambært § 53, stk. 2,3 í somu lóg.

Málið hevur verið til 1. viðgerð á býráðsfundi 31. oktober 2013 og varð einmæld avgerð tikin um at taka undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini og beina málið til 2. og endaliga viðgerð á komandi býráðsfundi.

**Avgerð:**
Samtykt varð at góðkenna eykajáttanina til Mentanarhúsið upp á kr. 300.000,00 við 2. og endaligari viðgerð, hetta sambært tilmælinum frá fíggjarnevndini frá 30. september 2013. (9-0).

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 19.00.

Magnus S. Midjord

Sigga Óladóttir Joensen

Dánjal Vang

Eyðun á Lakjuni

Petur Abrahamsen

Sigurð S. Simonsen

Árant Berjastein

Birgir Peteresn

Sonni á Horni

Skrivari:

Jákup Frants Larsen

Marin S. Thomsen